## Samstarv ímillum fakfólk

Ferðslutrygdarætlanin og yvirlitið yvir miðbýin á Tvøroyri og býin sum heild, er vorðið til sum eitt toymisarbeiði ímillum arkitektarnar Albert Isfeld og Gudmund S. Hansen og LBF, haðani Gunn H. Møller og Einar Brimnes hava arbeitt við ætlanini. Tummas Sørensen, býarverkfrøðingur á Tvøroyri, hevur samskipað arbeiðið. Hetta er ein ætlan, sum ikki bara snýr seg um at skipa gøtur, torg og tún í býnum. Endamálið hevur verið at skapa ein góðan og ferðslutryggan bý, har tað er gott at búgva, gott at fara til handils, gott at hitta fólk og sum gevur fólki møguleikar at fáa nøkur upplivilsi við sær heimaftur. Kortini hevur ein stórur partur av arbeiðnum miðað eftir at gera býin so ferðslutryggan sum, gjørligt. Men tað skuldi skuldi gerast so, at ferðslutrygd, umhvørvið og vakurleiki gingu hond í hond í eini heildarloysn.

# g hugnaligast

*Soleiðis fær ein partur av miðbýnum ætlandi at síggja út. Vegurin niðan av bryggjuni, sum á telduni sær út sum ein trappa, vegurin oman í miðbýin og vegurin ígjøgnum býin, verða knýttir saman í eini rundkoyring. Í urtagarðinum vestanfyri Kommunuskrivstovuna er ætlanin at gera eitt torg og omanav torginum er ætlanin at gera eitt annað torg til standmyndir. Av Miðbrekku, "Hotelbrekkuni" verður ikki koyrandi oman á høvuðsvegin og tað verður tað heldur ikki úr Miðtúni, sum er brekkan við kommunuskrivstovuna. Eisini aðrastaðni í býnum, við bedingina, innanst í Húsgarði og aðrastaðni, verða smá torg gjørd.*



vandan fyri ferðsluóhappi afturímóti, har bussurin skal skifta koyribreyt, hvørja ferð, hann steðgar.

Samstundis fara fótgangarar at brúka hesi støðini at fara yvirum vegin, tí har er vegurin smalast.

Har tað ber til, verða innvik gjørd til parkering fyri at sleppa undan at bilar standa allastaðni framvið vegnum.

Eftir ætlan skal tað eisini tálma ferðina, at trý býarportur verða gjørd, eitt nakað inni í Trongisvági, eitt hvør síni megin miðbýin. Býarportrini verða markerað við trøum, serligum flísum á vegnum og lampum

Fyri at bøta um ferðslutrygdina í miðbýnum, verða síðuvegirnir hjá høvuðsvegnum gjørdir til blindir vegir og við stóra vegamótið mitt í býnum, verður gjørd ein rundkoyring.

Annars verða ongir kantsteinar nakrastaðni, so at tað verður lætt hjá rørslutarnaðum at ferðast.



*Her sæst ein størri partur av býnum. Trøð og torg*

Fyri at gera tað hugnaligt, skulu torg gerast ymsastaðni í býnum og við miðbýin skal eisini eitt torg gerast til standmyndir.

Framvið sjónum, longur inni á fjørðinum, verður gjørt eitt smábátaøki við øllum tí, sum har til hoyrir.

Í hesi ætlanini skal eisini hugsa um at varðveita friðað støð og bygningar pg onnur serlig støð.

Ein avmarking er sjálvandi, at Sjógøta er rættiliga smøl, men tað hevði verið eitt óhugsandi tiltak at tikið allar garðarnar og nógv hús niður fyri at breiðka vegin.

Tá iá býráðið samtyktu ætlanina, vóru teir samdir um, at talan er um eitt valaverk, sum verður eitt sera hent amboð hjá kommununi, tá ið framtíðar útbyggingar skulu gerast.

## 20 ferðsluóhapp um árið

| | Við Føroya Banka | Við Tangabúðina |
|---|---|---|
| Miðalferðin | 32 km/t | 45 km/t |
| 85% fraktil | 46 km/t | 56 km/t |
| Døgnferðsla | 2600 | 2080 |
| Tung Ferðsla | 11% | 13% |

*Ferðslukanningar á Tvøroyri vísa, at við Tangabúðina koyra bilarnir munandi skjótari enn teir gera í sjálvum miðbýnum*

Í sambandi við menningarætlanina hjá Tvøroyrar Kommunu, eru tvær ferðsluteljingar gjørdar á Niðara Vegi, sum nú eitur Sjógøta. Onnur teljingin var við Føroya Banka og Posthúsið og hin var við Tangabúðina. Talvan vísti, at við Føroya Banka var miðalferðin 32 km/t, men við Tangabúðina koyrdu bilarnir væl skjótari ella 45 km/t í miðal.

Tølini í teiginum "85% fraktil", merkja, at við Føroya Banka koyrdu 85% av bilunum undir 46 km/t og við Tangabúðina koyrdi 85% av bilunum undir 56 km/t.

### 101 óhapp

Annars er eisini gjørt upp, hvussu nógv ferðsluóhapp eru hend í Sjógøtu hesi seinastu fimm árini. Tann samanteljingin vísir, at hesi seinastu fimm árini eru hend heili 101 ferðsluóhapp á Sjógøtu. Tað eru 20 um árið í miðal.

Av hesum eru rættiliga nógv óhapp hend á parkeringsøkinum við Statoil og á vegamótunum í miðbýnum, har síðuvegir eru bundir í Sjógøtu.

Fýra av óhappinum høvdu fólkaskaða við sær.

Men her skal viðmerkjast, at hetta eru tey óhappini, sum eru fráboðað løgregluni, so hugsandi er, at nøkur óhapp hava verið afturat, sum ikki eru meldað.